Umhvørvisstovan
Traðagøta 38
165 Argir

1. februar 2024

Hoyringssvar til elveitingarlógina

Í framhaldi til teldupostin, sum vit sendu tann 22. Januar 2024 hava vit hesar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Øllum kunnugt verður neyðugt at el-framleiðslan í Føroyum verður fleirfaldað, kanska 15 til 20-faldað næstu árini, um tað skal bera til at røkka teimum málum, sum vit hava sett okkum í sambandi við grøna orkuskiftið.

Tað má eisini vera øllum greitt at her er talan um eina uppgávu sum tað almenna umvegis SEV ikki hevur møguleika at lyfta einsamalt og tað er eftir okkara hugsan heldur ikki ynskiligt at almennu Føroyar umvegis SEV, ella á annan hátt, bindir so nógvan kapital og orku í hesa risa útbygging.

Eftir okkara hugsan er avgerandi neyðugt at privatir aktørar eisini verða partar av hesi útbygging.

Magn er – saman við Effo- við til at veita nógv tann størsta partin av orkunýtsluni í Føroyum umvegis oljusølu. Olja verður nøkur ár framyvir framvegis ein týðandi partur av orkunýtsluni í Føroyum og Magn fer eisini komandi árini at veita olju til føroyska marknaðin á landi og sjógvi, men ásannandi at olja helst skal skiftast út við aðra orku, sum skal verða grøn, er tað ein partur av framtíðar handilsætlan hjá Magn at veita føroyingum grøna orku. Men hetta má verða á handilsligum grundarlagi í fríari kapping við aðrar veitarar og tað er neyðugt at lógarverkið fer at gera tað møguligt hjá hesum veitarum at virka.

Magn hevur verið við til at seta upp eina vindmyllulund og hevur vunnið sær góðar royndir innan el-framleiðslu, men tað er eingin loyna at íløgan í vindmyllur, sum selja alla sína framleiðslu til SEV bert er fyrsta stig í tí handilsætlan, sum Magn kundi hugsað sær at virka eftir í framtíðini. Hjá Magn hevur ætlanin frá byrjan verið at fáa møguleika at framleiða el og sjálvir at hava møguleika at selja hendan streym til endabrúkarar.

Magn P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn
Tel. +298 34 74 00 | Fax. +298 34 74 90 | V-tal/VAT No. 321621 | magn@magn.fo | magn.fo

Veitingartrygd er sjálvandi avgerandi og í einum lítlum fjarskotnum landi sum Føroyar eru, er tað sjálvandi umráðandi at ein sterkur veitari sum SEV samskipar og borgar fyri veitingartrygd, men tað hevði tænt samfelagnum betri um privatir aktørar – eins og í øðrum vinnum - eisini sluppu at virka fyri ein so stóran part sum gjørligt, uttan at veitingartrygdin verður sett í vanda. Her halda vit at gongdin á teleøkinum er ein góð fyrimynd, har almenna felagið framvegis er størsti veitarin, men er í kapping við aðrar og tí noyðist at framleiða og veita teletænastur so bíliga sum gjørligt.

Men fyriliggjandi lógaruppskot ger tað á ongan hátt hugaligt, ella áhugavert hjá privatum íleggjarum at luttaka í útbyggingini. Uppskotið skapar á ongan hátt møguleika fyri at aktørar, sum hava handilslig endamál, fara at gera íløgur í útbyggingina.

Í uppskotinum verður skrivað um at skilmarka SEV millum monopolvirksemi og kappingarútsett virksemi, men her eiga nógv greiðari reglur at verða gjørdar har SEV veruliga verður býtt í tvey, har el-netið er ein partur, sum aðrir kunnu keypa sær atgongd til, meðan tann parturin av SEV sum skal selja til brúkarar, verður fyri seg og skal kappast við aðrar og eisini skal keypa sær atgongd til netið. Tað besta hevði verið at talan gjørdist um tvey systurfeløg við somu eigarum, men ymsum leiðslum.

Ásetingarnar um at onnur skulu keypa streym fyri heilsøluprís frá SEV og so hava møguleika at selja í smásølu, fara ikki at gera tað møguligt hjá nøkrum veruliga at kappast við SEV, serliga ikki um SEV fer at kunna hava ymiskar prísir til ymsar tíðir á døgninum.

Tí mæla vit til, heldur enn bara at dagføra verandi lóg eftir sama leisti sum higartil, at ein heilt nýggj elveitingarlóg eigur at verða orðað, har vit saman við øðrum aktørum sleppa at koma við okkara hugskotum til hvussu el-marknaðurin eigur at verða skipaður heilt frá framleiðslu til sølu til endabrúkaran.

Vinaliga

Finn Jakobsen

Magn P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn
Tel. +298 34 74 00 | Fax. +298 34 74 90 | V-tal/VAT No. 321621 | magn@magn.fo | magn.fo